Fróðskaparsetur Føroya

11. mai 2009

**Fundarfrágreiðing til stýrisfund nr. 5/2009**

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Mikudagin 6. mai kl. 09.00-15.00 og hósdagin 7. mai 2009 kl. 09.00-12.45 |
| Fundarstað: | Føroya Læraraskúli |
| Til staðar: | Lis Mortensen, stýrisforkvinna, Jan Mortensen, næstformaður, Tove Bull, Winny í Pætursastovu, Robert (Jim) Brown, Anni Djurhuus, Jóan Pauli Joensen, rektari, og Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri. Undir viðgerðini til mál 2 vóru Jóannes Hansen, rektari, Dagbjartur Debes og Mikkjal Mikkelsen frá FLSK til staðar, og til mál 5 og 6 var Hugin Skaalum, fíggjarleiðari, til staðar undir viðgerðini. |

**Dagsskrá 6. mai:**

1. **Strategiætlan fyri Fróðskaparsetrið.** (J.nr. (3) 10-11.01-2007005). Serstøk fundarfrágreiðing til hetta mál.

2. **Rektarin á Læraraskúlanum kunnar um skúlan, og rektarin ella umboð fyri skúlan kunnar um nýggju lærara- og námsfrøðiútbúgvingina.** (J.nr. (3) 10-02-20070018). Kunning frá Føroya Læraraskúla um tvær dagførdar útbúgvingar á skúlanum: Lærara- og námsfrøðiútbúgvingina. Báðar útbúgvingarnar taka 4 ár. Tær eru skipaðar sum ein 3 ára bachelorútbúgving við einum 4. ári, sum er yrkisrættað fyri pedagogar og lærarar.

   Arbeiðið við at skapa eina nýggja lærara- og pedagogútbúgving hevur tikið útgangsstøði í PLÚ- álitinum, men samstundis hevur mann hugt eftir, hvussu útbúgvingarnar síggja út í londum, ið vit vanliga samanbera okkum við. Leiðslan hevur t.d. verið og vitjað útbúgvingarstovnar bæði í Íslandi og í Danmark. Umframt at hava samband við serkøn fólk og stovnar í Danmark og Íslandi hevur leiðslan javnan verið í sambandi við rektaran á Fróðskaparsetrinum. Tað hevur stóran týdning at tryggja, at útbúgvingarnar kunnu vera grundarlag undir víðari lestri á øðrum lærustovnum.

   Av størri broytingum í lærara- og pedagogútbúgvingunum kunnu hesar nevnast: Útbúgvingin er í dag vísindaástøðiliga grundað, eitt didaktiskt perspektiv er innskrivað í allar lærugreinar, og lærugreinarnar eru settar saman av modulum, sum hava ECTS ásetingar og verða eftirmettar. Harumframt er eitt didaktiskt perspektiv innskrivað í allar lærugreinar á læraraútbúgvingini.

   Millum avbjóðingarnar á Læraraskúlanum er uppstigan av førleikanum hjá starvsfólkunum, soleiðis at tey fáa førleika at undirvísa á BA støði, umframt at granska og


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272 | J. C. Svabos gøta 14 | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |
| FO 110 Tórshavn | FO 100 Tórshavn | | | | |

undirvísa í møguligum MA ætlanum.

**Dagsskrá 7. mai:**

3. **Góðkenning av fundarfrágreiðing nr. 3/2009 á stýrisfundi 12. og 13. mars 2009 og fundarfrágreiðing nr. 4/2009 á stýrisfundi 26. mars 2009.**
Fundarfrágreiðing nr. 3/2009 góðkend og fundarfrágreiðing nr. 4/2009 góðkend við einum innanhýsis notati frá 7. mai sum ískoyti til mál 3 í fundarfrágreiðingini.

4. **Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend.

5. **Status á fíggjarstøðuni 2009.** (J.nr. (3) 10-12-20070011).
Fíggjarleiðarin legði fram frágreiðingina um fíggjarstatus fyri 2009, og hon varð tikin til eftirtektar. Samtykt varð, at fyrisitingin á Seturskrivstovuni framyvir skuldi senda Stýrinum mánaðarliga játtanarroknskapin til kunningar, umframt at stýrið fyri hvønn ársfjórðing fær útgreinaða frágreiðing til staðfestu nýtsluna í mun til játtanina.

6. **Fíggjarlógaruppskot fyri 2010.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070008).
Uppskot til fíggjarætlan fyri Fróðskaparsetur Føroya varð tikið til eftirtektar.
Kjak var um leiklutin hjá Fróðskaparsetrinum sum ein týðandi útbúgvingar- og granskingarstovnur í Føroyum, ið er við til at økja tilfeingið av útbúnum fólkum í landinum. Í sambandi við setanina av stýrislimum til nýggja stýrið legði politiska skipanin upp til, at stýrislimirnir skuldu vera við til at menna Fróðskaparsetrið. Stýrið ásannar, at veruleikin í dag er ein heilt annar enn tann, stýrið fekk kunning um í desember í fjør. Stýrið metir, at sum er, eru ikki resursir á Fróðskaparsetrinum til at menna stovnin í hesum árinum. Semja var um, at stýrið eigur at geva greið boð til politisku skipanina um, at tað hevur eitt ávíst minstakrav til fíggjarjáttan til Fróðskaparsetrið.

7. **Reglugerð fyri stýrið á Fróðskaparsetrinum og fyri stýrisarbeiðnum.** (J.nr. (3) 10-00-2007009).
Uppskot til reglugerð varð viðgjørd, og samtykt varð, at reglugerðin við broytingum verður tikin upp aftur til viðgerðar á komandi stýrisfundi í september.

8. **Samsýning til stýrislimir.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Samtykt varð, at umframt samsýning til stýrislimir eiga stýrislimir, sum búgva uttanlands, at fáa lønarendurgjald fyri tveir dagar í sambandi við hvønn stýrisfund, sum verður hildin í Føroyum. Harumframt varð eisini samtykt, at stýrisforkvinnan fær lønarendurgjald fyri eykaarbeiði fyrstu 4 mánaðarnir í ár.

9. **Rektarastarvið.** (J.nr. (3) 10-22.02-20070001).
Serstøk fundarfrágreiðing til hetta mál.

10. **Uppskot til viðtøkur fyri Granskingardepilin fyri samfelagsmenning.** (J.nr. (3) 10-03-20070005).
Stýrið metir, at resursirnar til gransking og undirvísing verða gagnnýttar á besta hátt, um Granskingardepilin fyri samfelagsmenning framvegis verður partur av Fróðskaparsetrinum. Av tí at málið liggur í MMR, bleiv ongin avgerð tikin í málinum á hesum fundinum, og málið verður tikið upp aftur á komandi stýrisfundi.

11. **Endurskoðan av reglugerð fyri vali av starvsfólki og lesandi í stýrið.** (J.nr. (3) 10-01-20070019).
Reglugerðin varð samtykt við broytingum.

12. **Ognirnar hjá Fróðskaparsetrinum (Lindbergs Hús og Fróðskapur).** (J.nr. (3) 10-35-20070004).
Eitt yvirlit yvir ognirnar hjá Fróðskaparsetrinum varð lagt fram. Stýrið samtykti, at tað skuldi heitast á MMR um at flyta ognirnar hjá Fróðskaparsetrinum í ein sjálvstøðugan grunn.

13. **Ymist**
Kunning um fund í MMR 21.04.2009

14. **Ætlan fyri komandi stýrisfundum.** (J.nr. (3) 10-01-20070004).
Komandi stýrisfundir verða 1. og 2. september og 5. november 2009.

RH/JPJ